

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 12 - 2012

# Iran spennir vøddarnar í Hormuz-sundinum

Iranski herflotin er farin undir eina seks dagar langa venjing í Hormuz-sundinum, sum er tann sera týdningarmikla siglingarleiðin til og úr Persaflógvanum. Herflotaovastin, Habibollah Sayyari, sigur við ta almennu tíðindastovuna IRNA, at venjingin er ætlað at vísa umheiminum, hvat tað iranska hervaldið er ført fyri at útinna. Tíðindastovan viðmerkir í hesum viðfangi, at 40 prosent av allari olju, sum verður flutt við skipi, fer ígjøgnum sundið. Iran hevur fyrr hótt við at lata Hormuz-sundið aftur, um onkur skuldi funnið uppá at søkt at landinum orsakað av tess kjarnokruætlanum. Fyri einum ári síðani hevði iranski herflotin eina líknandi venjing í sundinum, og vesturlendsk herskip hava javnan venjingar har. Habibollah Sayyari sigur, at í venjingini hesaferð er ætlanin at royna rakettskipanina hjá herflotanum umframt at gera ymsar royndir við herskipum og kavbátum. ? ?